# Fyrsti leiðarin settur á Landssjúkrahúsinum

*Jóan Petur Davidsen er settur sum leiðandi yvirlækni á Skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum*

Áki Bertholdsen

Arbeitt verður nú við megi fyri at fáa nýggja bygnaðin á Landssjúkrahúsinum settan í verk.

Ætlanin er at bygnaðarbroytingarnar skulu vera lidnar í summar og nú verður søkt eftir fólki at manna tey ymsu nýggju størvini.

Herfyri varð nýggjur sjúkrasystrastjóri settur.

Og síðani er eisini Jón á Steig settur í starvið sum læknastjóri. Men tað er bara fyribils, tí tá ið starvið varð lýst leyst, var bara ein umsøkjari og tað helt Almanna- og heilsumálastýrið var ov lítið og tí er starvið lýst leyst av nýggjum.

Annars skal ein leiðandi yvirlækni og ein leiðandi sjúkrasystir setast til hvørja av teimum trimum deildunum á sjúkrahúsunum, Skurðdeildini, Medisinsku deild og Psykiatrisku deild.

Og tað fyrsta av hesum størvum er nú sett.

Tað er Jóan Petur Davidsen, yvirlækni, ið er settur í starvið sum leiðandi yvirlækni á Skurðdeildini.

Maria á Dul í Almanna- og Heilsumálastýrinum, sigur, at størvini blivu í fyrstu syftu lýst leys innanhýsis á Landssjúkrahúsinum, men tað kom bara umsókn og hon var til starvið sum leiðandi yvirlækni á Skurðdeildini.

Hendan eina umsóknin var frá Jóan Petur Davidsen og hann er nú settur í starvið.

Hini størvini sum leiðandi yvirlæknar á teimum ymsu deildunum, og størvini sum tær leiðandi sjúkrasystrarnar, umframt starvið sum læknastjóri, eru øll lýst leys av nýggjum og tey verða væntandi sett nú í summar.

Leiðandi yvirlæknin og leiðandi yvirsjúkrasystirin á teimum ymsu deildunum fáa í felag ábyrgdina av deildini, sum tey arbeiða á.

Tað merkir, at tey skulu leiða deildina í felag.

Men kemur tað til skarpskeringar, er tað kortini yvirlæknin, sum hevur heimild at skera ígjøgnum, uttan í teimum førum, har talan er um røktarfakligar spurningar burturav, tí tá hevur leiðandi sjúkrasystirin evstu ábyrgdina einsamøll, sigur Maria á Dul.

Jóan Petur Davidsen tók við starvinum sum leiðandi yvirlækni tann 10. juni.

Hann tók annars læknafrøðiligt prógv í 1978 og síðani hevur hann arbeitt í Danmark og í Svøríki.

Hann kom á Landssjúkrahúsið í 1991, men í 1994-1995 hevði hann farloyvi, tá ið hann var í Noregi og arbeiddi.

Hann er serlækni í almennari kirkurgi og urologi, sum er læran um súkur í landrásini.

Hann er eisini formaður í føroysku deildini hjá serlæknafelagnum og tí hevur hann verið ein av teimum, sum hava verið mest frammi í sambandi við bygnaðarbroytingarnar á Landssjúkrahúsinum og toganina við sjúkrasystrarnar um leiðsluna á okkara høvuðssjúkrahúsi.

Men nú sigur hann, at hann er fegin um at spurningurin um bygnaðin er loystur.

– Vit hava nú fingið eina greiða leiðsluskipan. Eg sigi ikki, at allir trupulleikar hvørva beinanvegin. Men eg trúgvi fult og fast uppá, at vit nú hava fingið eitt gott støði, sum vit kunnu byggja á so at tað ber til at fáa meiri skipað viðurskifti á Landssjúkrahúsinum, sigur Jóan Petur Davidsen.



*Rættilig gongd er nú komin á arbeiðið at broyta bygnaðin á Landssjúkrahúsinum. Jóan Petur Davidsen er nú settur í tað fyrsta nýggja, leiðandi yvirlæknastarvið. Hann kann nú kalla seg leiðandi yvirlækna á Skurðdeildini*




Hondgjørt prýði til føroyska búnan

Støkk inn á gólvið og síggj okkara stóra og góða úrvæl av hondgjørdum prýðislutum úr silvuri til føroyska búnan.




Eisini hava vit skógvaspennir, knappar, stimar og aðrar prýðislutir til føroyska búnan





Pf. Eilif Arge
Tel 455164, Klaksvík

Fa. Magnussen, ur & optik
Tel 373232 Vágur

Ur- og Brillustovan
Tel 447950, Runavík

Ursmiðjan
Tel 332024, Sørvágur

3arin

SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR TEL 355 355









# Jóansøkan 2000

**Jóansøkan 2000 er í hondum. Stevnan er í ár í Vági og vágbingar hava seinastu vikurnar havt blikk og pensil í hond, skúlabørn eins og vaksin hava rudda› framvi› vegi og strond og umfatandi asfaltarbei›i er gjørt, sum er partur av størri heildarætlan. Handlar og fyritøkur hava fyrireika› seg til jóansøkuna, summargestir í útlegd vitja aftur í heimbygdini og í ár hittast 7 skúlaflokkar aftur í Vági at minnast aftur á gamlar dagar. Vágsbygd er snøgga› og er klár at taka ímóti og birta lív í jóansøkudreymar hjá gestum og sínum egnu vitjandi b‡arbørnum**



Mynd: Dagfinn Olsen